## Klaksvíkar kommuna

**Serstaka byggisamtyktin fyri Árnafjørð viðkað við nýggjum øki**

Við hesum verður kunngjørt sambært reglurnar í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954, at Klaksvíkar Býráð á fundi 21.oktober 2003 hevur samtykt at leggja út nýtt øki sum mentannar- og frítíðarøki í Árnafirði. - Talan er um økispart C5, liggjandi framvið landsvegi vestanfyri vegin - frá vegboganum og niðaneftir.

Møguleiki er at síggja ætlaðu broytingina á býráðsskrivstovuni, har hon verður liggjandi frammi inntil 8.august 2005

Møgulig mótmæli ella broytingaruppskot skulu verða býráðnum í hendi í seinasta lagi 16. oktober 2005 fyri at koma við í býráðsins endaligu viðgerð av broytingini.

Klaksvík 16.juli 2005

**Klaksvíkar Býráð**



Sosialurin Sosialurin Sosialurin

# Apotekari

Starv sum apotekari á Eysturoyar Apoteki, FO-620 Runavík, er leyst at søkja til setan 1. oktober 2005.

Sambært løgtingslov 104/88 § 8, stk. 1, hevur apotekarin ábyrgd av dagliga rakstrinum og at apotekið virkar samsvarandi galdandi reglum.

Umsøkjarin skal hava lokið prógv sum cand.pharm. Umsøkjarar, sum hava royndir innan fyrisiting, hava fyrimun.

Løn samsvarandi sáttmála millum Dansk Farmaceutforening og Fíggjarmálaráðið.

Umsókn við avriti av prógvum/viðmælum skal stílast til Almanna- og Heilsumálaráðið, og sendast Landsapotekaranum, Staravegur 15, Postsmoga 3087, FO-110 Tórshavn, áðrenn 15. august 2005.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Landsapotekaran á tlf. 350150.

Viðmerk á umsóknina "Apotekari".

**Landsapotekarin**
Staravegur 15
Postsmoga 3087
FO-110 Tórshavn

# Tilboð upp á skúlabarnaflutning

Fuglafjarðar kommuna loyvir sær hervið at lýsa skúlabarnakoyringina Hellurnar-Oyndarfjørð skúlaárið 2005-2006 leysa frá 15. august 2005 at rokna.

Talan er um flutning av trimum næmingum av Hellunum til skúlan í Oyndarfirði og flutningur aftur til Hellurnar eftir skúlatíð.

Tað verður kravt, at tann ella tey, ið átaka sær skúlabarnakoyringina lúka krøv um, at akfarið, ið nýtt verður, skal verða góðkent og skrásett til vinnuligan fólkaflutning, herundir tryggjað til vinnuligan fólkaflutning, og at førarin hevur galdandi koyrikort til vinnuligan fólkaflutning til persónbil ávikavist buss.

Møgulig tilboð, ið skulu verða skrivlig, skulu vera Fuglafjarðar kommunu, Postboks 30, 530 Fuglafjørður í hendi í seinasta lagi týsdagin 2. august 2005 kl. 15.00.

Kommunan skilir sær rætt til at velja millum innkomin ella einki at taka.

Fuglafjørður, tann 7. juli 2005

**Fuglafjarðar býráð**

## Hús í Norðdepli til sølu



Matr. nr. 42a í Norðdepli
Grundøki: uml 520 m²
Húsini: 6,60m x 12,20 m í tveimum hæddum
Húsini kunnu nýtast sum tvær íbúðir

Hetta eru betonghús klødd við timbur og hava DECRA tak. Á ognini er eisini hjallur.
Húsini liggja miðskeiðis í bygdini, og verða seld um hóskandi boð fæst.

**Nærri upplýsingar á tel 45 77 91**

## Hús á Viðareiði til sølu



**Ognin á Fløtini í Eiðsvík til sølu, um hóskandi boð fæst**

Matr. nr. 104
Grundøki: 1044 m²
Húsini: 6,6 x 7,60 m í tveimum hæddum við tilbygningi 2,00 x 8,45 m í einari hædd

Hetta eru betonghús bygd uml. 1948, ið eru klødd og bjálvað uml. 1980.

**Nærri upplýsingar á tel 45 77 91**

## TENNISVENJING

**Tennisvenjing verður aftur í summar. Vant verður hvønn týsdag og hósdag frá kl. 18.00 til kl. 19.30 á vallunum í Gundadali.**
**Øll eru hjartaliga vælkomin.**

**FM í tennis byrjar 1. august.**
**Tilmelding er á vallunum**

Havnar Tennisfelag



## Lær at skriva føroyskt á netinum !

Skeið fyrst í august.
Skriva til:
pallm@post.olivant.fo

Sosialurin 341800

# Bilhús til leigu

Bilhúsið á matr. nr. 26i, Toftavegur 11, verður hervið lýst til leigu.

Bilhúsið verður leigað í tí standi, tað er í.

Skrivlig tilboð skulu verða kommununi í hendi í seinasta lagi 15. august 2005, kl. 12.00.

**Vestmanna kommuna**

# Ferielukning

Kontoret er lukket p.g.a. ferie fra 15. juli til og med 7. august.

Vi kan dog kontaktes på tlf. 0045 40364465. Her kan også sendes en SMS besked.

**Grannskoðaravirkið Højmose, FRR**
v/ Børge Christiansen, Cand.merc.aud.
í Heiðum · 370 Miðvágur
tlf. 333498 · telefax 333490
e-mail: hoejmose@post.olivant.fo
www.rev-hoejmose.dk

# Adressur í Sandavági

Sambært § 7 í løgtingslóg nr. 17 frá 6. mars 2002 um adressur, er adressuskráin fyri **Sandavág** góðkend.

Skráin er almenn og tøk á www.matrikul.fo.

**Landsadressuskráin**
Boks 327
Tlf. 357900 - Fax. 357901
FO-110 Tórshavn
www.matrikul.fo - post@matrikul.fo

Lesið Sosialin -so eru tit við!